## Strika skuld hjá Haiti

Mannarættindafelagsskapurin Amnesty International skýtur upp, at øll uttanlandsskuldin hjá Haiti verður strikað. Felagsskapurin sigur, at myndugleikarnir í Haiti megna ikki at tryggja sínum fólki tey mannarættindi, sum reglurnar siga, tí landið brúkar so nógvar pengar til at rinda uttanlandsskuldina og renturnar av henni. Amnesty International mælir altjóða samfelagnum til at virka fyri, at børn, ung og kvinnur fáa neyðuga verju, nú tann haitiski samfelagsbygnaðurin liggur í sori orsakað av jarðskjálvtanum.



## Dømdur til deyða

Ein fyrrverandi avstralskur hermaður, ið arbeiddi sum leiguhermaður í Afghanistan, er dømdur til deyða í Kabul. Tann 38 ára gamli maðurin varð funnin sekur í at hava skotið ein afghanskan trygdarmann og fyri at hava roynt at geva Taleban skyldina. Avstralska stjórnin er ímóti deyðarevsing, men hon hevur ikki gjørt nakra viðmerking til málið um leiguhermannin. Maðurin arbeiddi tá hjá amerikanska trygdarfelagnum Four Horsemen International, tá hann sambært dóminum myrdi tann afghanska trygdarmannin.

# Ynskja Norrönu til Stavanger

**Føroyingar í Stavanger-økinum royna í hesum døgum at ávirka leiðsluna í Smyril Line soleiðis, at Norröna fer at leggja leiðina framvið oljubýnum á veg úr Danmark**

FERÐASAMBAND
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Prejkestolen er eitt av kendastu ferðafólkastøðunum í øllum Noregi, og tað liggur nærhendis Stavanger*

Stavanger er sum kunnugt oljubýurin burturav í Noregi, og hann dregur eisini føroyingar til sín. So mikið nógvar, at eitt føroyingafelag er sett á stovn í býnum.

Formaður er Tórður Olsen, og hann sigur, at bæði felagið sum so og føroyingar á leiðini royna at gera sína ávirkan galdandi, so Norröna fer at leggja leiðina framvið nýggju og stórt útbygdu havnini í býnum.

Risavika havn liggur heilt út móti havinum, og tískil er eingin sigling innanskers og eingin sigling inn eftir longum firðum, eins og tað er talan um, tá Norröna sigldi til Bergen.

Havnin og terminalurin er spildurnýtt og varð bygt í 2007. Ein av fyrimununum er, at plássið er gott hjá skipum at venda inni í havnini, og tað er mest sum klárt at koyra og ganga í land, so skjótt skipið hevur lagt at kai.

Tórður Olsen sigur, at hendan nýggja havnin er portrið til alt Europa, og tað er ein ørgrynna av trailarum, sum ferðast um havnina.

- Fyri okkum føroyingar, sum búgva her í økinum, hevði tað verið ein kærkomin farleið heim á klettarnar, og útrokningar vísa, at tað fer bara ein tími í siglingartíð at leggja leiðina um Risavika á veg úr Hanstholm til Føroya, sigur Tórður Olsen.

### Nógvir møguleikar

Stavanger er sum nevnt oljubýurin í Noregi, og tí hevur hann eisini eina ørgrynnu av tilboðum, sum kanska ikki finnast í øðrum norskum býum.

Har eru keypsmiðdeplar og eitt nærum ótal av søvnum, um hugurin stendur til tað.

Men har finnast eisini nøkur av fremstu ferðamannamálunum í Noregi. Ikki minst Prejkestolen, har fallskíggjaleyparar fyrr gjørdu sær dælt av at loypa út av. Hetta er kortini ikki loyvt, so tað verður ikki gjørt longur.

Býurin er modernaður, men eisini norðmenn hava dugað at varðveitt gamla býarpartin, eins og vit hava gamla Reyn her í Havnini.

Tórður Olsen sigur, at Norröna longu hevur lagt sína ferðaætlan fyri árið í ár, og tí verður eingin sigling upp á Risavika enn á sinni.

- Men eg havi skilt á lagnum, at leiðslan í Smyril Line umhugsar at gera ein jólatúr, har eitt legg verður gjørt inn í Risavika. Tað er kortini ikki nakað víst enn, men tað hevði verið upplagt at roynt havnina og viðurskiftini í havnini ein slíkan túr, sigur Tórður Olsen.

Vit fara í komandi bløðum at venda aftur til Stavanger og møguleikarnar at sigla upp á Noregi aftur.

# Góður prísur fyri seyðin

**Tað savnar bæði fólk og spenning, tá brundarnir úr ymsu hagapørtunum verða seldir í januar mánaði, og soleiðis var eisini í gjárkvøldið í Nólsoy**

UPPBOÐSSØLA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Prísirnir hava verið sera góðir fyri verðagjólingarnar í ár*

Tað var lagt upp til stóran spenning, tá størsti hagaparturin í Nólsoy, Heimarahelvt, seldi seinastu verðagjólingarnar í gjárkvøldið.

Tríggir høvdu gingið eftir, men seyðamenninir fingu fatur á teimum um vikuskiftið, og sølan fór so fram í gjárkvøldið. Og lagt var upp til eitt sindur av spenningi, tí tað ljóðaði, at fimm mans vildu hava hvør sín, og tá bert tríggir vóru at kappast um, kundi uppboðssølan gerast spennandi.

Tí kendist tað eisini heldur undarligt, at fyrsti brundurin fór fyri bert 1500 krónur, og bert tveir mans bjóðaðu upp á hann.

Hinir báðir vóru tó prúðari, og gongd kom eisini á boðini. Fyrri endaði á 3000 krónum, meðan hin seinni fór fyri heilar 3800 krónur.

Uppboðshaldari hesaferð var røktingarmaðurin, Rene Hansen, og hann var væl nøgdur við prísin.

- Vit hava hildið ein meðalprís í ár upp á góðar 2700 krónur og tað er heilt væl. Undanfarin ár hevur besti meðalprísur ligið um tær 1700 krónurnar, so vit skulu ikki lata illa at, sigur Rene Hansen.

Hann sigur, at teir í ár hava havt 14 brundar í Heimaruhelvt, og teir eru allir seldir.

- Vit høvdu ein veturgamlan veðr og ein tværvetur gamlan, og teir fóru fyri ávikavist 3500 og 5300 krónur, sigur Rene Hansen.

Prísurin vísir, at áhugin fyri verðagjólingunum er stórur, og tað er væl, tí tað er fyri so vítt tað, ið hagapartarnir hava av inntøkum.

Tað má roknast við, at tað er áhugin í at hava seyð ið setur prísin, tí hesir verðagjólingarnir eru munandi dýrari enn íslandskjøtið, ið fæst til keyps í handlunum.

- Tað er nokk áhugin fyri seyðahaldi og so tað sosiala í tí at hava seyð, ið dregur, sigur Rene Hansen.